FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 8. mai 2024
J. nr.: 23/20623-13
Viðgjørt: DH

Viðmerkingar frá fíggjarmálaráðnum til útrokningar, sum eru gjørdar fyri FFU

Í skrivi, sum er sent til løgtingsins fíggjarnevnd í sambandi við LM-104/2023, um aftur at innføra §154b í skattalógini, kemur m.a. fram, at føroyskir fiskimenn í Norra vera harðari skattaðir enn onnur.

Fíggjarmálaráðið er biðið um at viðmerkja skrivið og útrokningarnar. Viðmerkingarnar eru í tveimum. Fyrri partur er til útrokningarnar og dømini í skrivinum og seinni partur er um reglurnar viðv. almannapensjón.

Til útrokningarnar
í skrivinum verður vist á, at hjá fiskimanni í Føroyum verður gjaldið til eftirløn drigið frá, tá skattskylduga inntøkan skal finnast. Viðmerkjast skal, at tað sum goldið verður til eftirløn skal skattast serskilt við 40% og tí skulu 36.000 kr. leggjast afturat samlaða skattinum í hesum dømunum.

Í dømunum sæst ikki hvussu skattirnir eru roknaðir, hvørji gjøld eru við og um fiskimaðurin í Norra er sosialt tryggjaður í Føroyum ella í Norra.

Viðv. frálandavinnu í Norra er ikki greitt hvussu roknað verður.

Tey, sum arbeiða uttanlands fáa ein uttanlandsfrádrátt og rinda 35% í skatti av restini, umframt sosialgjøld, hesir persónar eru tryggjaðir. Tó vera persónar, sum arbeiða í Norðurlondum á sjógvi ella landi í dag linkaði við undantaki (exemption), tí rinda persónar, sum einans arbeiða í norsku frálandavinnuni í norskum sjóøki, skatt í Norra og ongan skatt í Føroyum.

Landstýriskvinnan fer í næstum at boða hinum Norðurlondunum frá, at Føroyar fara at broyta linkingarhátt, til frádráttarlinking (kredit).

Talvan niðanfyri vísir, hvussu fýra bólkar vera skattaðir.
Grundarlagið í útrokningunum er:

- Lønarinntøka á 750.000 DKK.
- Broytingar í fiskimanna- samdøgurs og uttanlandsfrádrátti eru framdar (2026 og fram)
- Landsskattur sum eftir galdandi lóg frá 2025 og fram
- Almenn gjøld, sum tey eru í løtuni
- Kommunuskattur á 20% við einum botnfrádrátti á 30.000 kr.
- Kirkjuskattur á 0,60%

		vanligt inntøka	Fiskimaður (FO)	Fiskimaður (NO)	Uttanlandsinntøka
1	**Inntøka (løn)**	**750.000**	**750.000**	**750.000**	**750.000**
2	**Frádráttur**	**-**	**42.000**	**60.000**	**48.000**
	Fiskimannafrádráttur		42.000	42.000	
	Samdøgursfrádráttur			18.000	
	Uttanlandfrádráttur				48.000
3	**Skattskyldug inntøka**	**750.000**	**708.000**	**690.000**	**702.000**
4	**skattur (land og kommuna)**	**287.950**	**266.950**	**257.950**	**245.700**
5	**gjøld og kirkjuskattur**	**47.956**	**45.789**	**6.096**	**6.168**
	kirkjuskattur (0,6%)	4.500	4.248	4.140	4.212
	als (0,8% - max 5200kr)	5.200	5.200		
	ameg (3%)	22.500	21.240		
	heilsutrygd (0,7% + 175 kr./mðr.)	7.350	7.056		
	barsil 0,86%	6.450	6.089		
	kvf (163 kr./mðr.)	1.956	1.956	1.956	1.956
4+5	**Skattur og gjøld í alt**	**335.906**	**312.739**	**264.046**	**251.868**
1-(4+5)	**Netto eftir**	**414.094**	**437.261**	**485.954**	**498.132**
	útlendsk gjøld (7,8%)			58.500	58.500
	eftir í alt	414.094	437.261	427.454	439.632
	miðalskattur íroknað (NAV)	44,8%	41,7%	43,0%	41,4%

Samanberingin er bert fyri skatt av lønarinntøku og ikki fyri eftirløn.

Løntakarin á landi í Føroyum og fiskimaðurin í Føroyum skulu rinda til eftirløn í Føroyum og verða skattað av 40% við inngjald, meðan útgjaldið er skattafrítt. Tey, ið rinda til NAV, eru frítikin fyri at rinda til egna eftirløn, meðan skattur av útgjaldi frá pensjón og øðrum veitingum verður skattað.

Talvan omanfyri vísir, at fólk, ið ikki hava inntøku frá arbeiði á landi í Føroyum rinda minni skatt. Um fiskimaðurin í Norra rindar til NAV, hevur hann nakað minni eftir enn fiskimaðurin í Føroyum, men meira eftir enn ein sum arbeiðir á landi í Føroyum.

Í samanberingum annars hevur verið frammi, at í øðum londum fæst frádráttur í skattskyldugu inntøkuni fyri sosialgjøld. Í føroysku bruttoskattaskipanini er tó hvørki frádráttur fyri útlendsk ella føroysk sosial gjøld, og tí verða sosialu gjøldini viðgjørd eins.

Sambært rentutryggingarlógini fæst tó frádráttur, um goldið verður til egna eftirløn. Bæði í Føroyum og uttanlands.

Samanumtikið verða bæði sosial gjøld og gjøld til egna eftirløn viðgjørd eftir somu reglum uttan mun til, um talan er um persónar, sum arbeiði í Føroyum ella uttanlands.

Til reglurnar viðvíkjandi almannapensjón
Í útrokningini, sum er gjørd vegna Føroyskir fiskimenn uttanlands (FFU) verður víst á, at fólkapensjónin ger støðuna hjá føroyskum fiskimonnum í Norra uppaftur verri í mun til fiskimenn í Føroyum grundað á, at teir rinda til fólkapensjónina í Føroyum umvegis vanliga lønarskattin, men tá teir so røkka pensjónsaldur, fáa teir ikki fólkapensjón útgoldna í Føroyum, tí hon verður mótroknað í eftirlønargjaldinum, sum teir fáa úr Norra.

Fíggjarmálaráðið skal viðmerkja, at tað er ógreitt, hvat víst verður til í hesi viðmerking, og helst er talan um eina misskiljing.

Útgjald frá útlendskari sosialari pensjón verður ikki mótroknað í fólkapensjónini. Tað er beinleiðis ásett í almannapensjónslógini § 20 stk. 1, nr. 1. Undantakið er orðað soleiðis:

§ 20. Inntøkugrundarlagið er seinast uppgjørda skattskylduga inntøkan sambært skattalógini, undantikið
1) sosialar pensjónir, herímillum pensjón eftir hesi lóg og sosial pensjón, útgoldin sambært lóg í einum landi, sum sáttmáli er gjørdur við um pensjón og sosialar veitingar annars við samsvarandi endamáli, og…

Útgjald frá Folketrygd, sum gjaldið til NAV m.a. fevnir um, er, eins og føroyska fólkapensjónin, ein sosial pensjón sbrt. Norðurlendsku konventiónini um Sosiala Trygd[i] og verður tí ikki mótroknað í fólkapensjónini.

Helst verður í viðmerkingini sipað til, at eftir Norðurlendsku konventiónini um Sosiala Trygd, ið byggir á ES reglur, ber ikki til at vinna sær sosiala pensjón úr tveimum ella fleiri londum fyri sama tíðarskeið. Forboðið móti dupultari veiting í art. 10 í ES fyriskipan 883/04 er ætlað at forða fyri, at persónur kann vinna sær rætt til sosiala pensjón í tveimum londum fyri sama tíðarskeið. Forboðið er tó bert galdandi í tí einstaka landinum, um tað er ásett í lóg, soleiðis sum tað t.d. er ásett í donsku pensjónslógini.

Einki slíkt forboð er higartil ásett í føroysku almannapensjónslógini, og tí kunnu t.d. føroyskir fiskimenn, sum sigla við norskum skipi, vinna sær rætt til sosiala pensjón, bæði úr Norra og Føroyum, fyri sama tíðarskeið; viðkomandi vinnur sær so statt bæði rætt til føroyska fólkapensjón og Folketrygd í sama tíðarskeiði. Hetta er tó treytað av, at rindað verður til NAV. Tað er sjálvandi somuleiðis ein treyt, at viðkomandi lýkur treytirnar um heimarætt, fastan bústað o.a. eftir føroysku almannapensjónslógini. Hesir vinna sær tí munandi betri rættindi enn føroyskir fiskimenn, sum sigla við føroyskum skipi, og bert forvinna sær rætt til føroyska fólkapensjón.

Um eitt forboð móti dupultari veiting verður ásett í føroysku almannapensjónslógini, verður framvegis møguligt at fáa sosiala pensjón úr báðum londum, men ikki fyri sama tíðarskeið. Hetta kemst av, at rætturin til føroyska fólkapensjón verður vunnin eftir *bústaðartíð* frá tí fylta 15. árinum og til pensjónsaldur er rokkin.

Dømi 1:
Ein føroyskur fiskimaðurin, sum hevur fiskað við norskum fiskiskipi í t.d. 12 ár og rindar til NAV hesi árini, vinnur sær rætt til norska sosiala pensjón (Folketrygd) fyri hetta *arbeiðstíðarskeið.* Fyri sína bústaðartíð í Føroyum vinnur hann sær rætt til fulla fólkapensjón úr Føroyum. Orsøkin er, at pensjónin verður ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 40 ár. 40 ára bústaðartíð í Føroyum (íroknað bústaðartíð í Danmark og Grønlandi) gevur rætt til fulla fólkapensjón. Er bústaðartíðin minni enn 40 ár, verður sonevnd brotpensjón latin. 52 ár er mesta

bústaðartíð (15 til 67ár), og verða árini, sum pensjón verður innvunnin í t.d. Norra, drigin frá. Fyri at halda dømið einfalt er roknað við 67 ára pensjónsaldri.

Dømi 2:
Fyri føroyskan fiskimann, sum siglir í Norra í t.d. 20 ár og rindar til NAV hesi árini, merkir tað, at hann fær norska sosiala pensjón (Folketrygd) fyri hesi 20 árini, og fyri bústaðartíðina í Føroyum fær hann 32/40 av fullari fólkapensjón. Hetta svarar til 52 ára bústaðartíð millum 15 og 67, frádrigið tey 20 árini, har sosial pensjón verður innvunnin í Norra.

So hvørt pensjónsaldurin hækkar, hækkar eisini lutfallið við føroyskari pensjón til fyrimuns fyri tann, sum vinnur sær almenna pensjón í øðrum Norðanlandi.

Sum nevnt er forboðið móti dupultari veiting ikki ásett í føroyskari lóggávu, og tí vinna føroyingar, sum arbeiða og vinna sær rætt til sosiala pensjón í øðrum Norðanlandi, alt annað líka, betri sosial pensjónsrættindi, enn persónar, sum arbeiða í Føroyum. Ein føroyskur fiskimaður í Norra vinnur sær, alt annað líka, betri sosial pensjónsrættindi, enn ein føroyskur fiskimaður, sum siglir við føroyskum fiskiskipi, tá rættindini til norska sosiala pensjón og føroyska sosiala pensjón verða løgd saman.

---

[i] Bekendtgørelse nr. 15 af 23. august 2019 om udvidelse til Færøerne og Grønland af nordisk konvention af 12. juni 2012 om social sikring med tilhørende administrativ aftale, skal 1.